TB-Skála 1-0 (1-0):

# Ein Skála móti Skála

**Bjargingarroyndin, sum TB flotaði fyri viku síðani, tykist eydnast væl, meðan søgan um laka endaspurtin tykist endurtaka seg hjá Skála**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað gongur skjótt fyri seg í fótbólti. Fyri bara átta døgum síðani mundu nøgvir fótbóltsfjepparar kring landið vera sannførdir um, at TB eftir bara eitt ár við Formula-fótbólti aftur skuldi vera at finna í aðru deild komandi kappingarár.

Gaman í hevði TB dystir eftir eins og hini liðini, men við fimm stigum upp til næst aftasta liðið, tóktist støðan ikki sørt vónleys.

### Álop frá fyrsta bríksli

Fortreytirnar broyttust tó nakað við sigrinum á GÍ, og sunnudagin tók TB enn eitt fet á leiðini, tá teir at kalla framdu ein »Skála« móti Skála.

Við einum Skála verður sjálvandi sipað til bjargingarroyndirnar, sum Skála framdi tey bæði fyrstu árini, sum teir vóru í bestu deildini. Í báðum førum á tann hátt, at liðið við trimum sigrum í seinastu trimum dystunum akkurát fekk tunga likamspartin upp úr vatnskorpuni.

Sigurin móti GÍ varð kanska fyrst og fremst eitt úrslit av, at TB spældi nógv meira framrættað, enn teir hava gjørt fyrr í ár, og tí mundi tað vera eitt gott hugskot, um sama uppskriftin varð nýtt móti Skála.

Og tað var við hepnari hond, skuldi tað vísa seg. Longu eftir níggju minuttum gjørdist Dejan Tomic einsamallur við Eugen Voda, og so kundi framherjin, sum hevur víst seg sum góður fongur hjá TB, enn einaferð smekka í kassan.

Og hetta vísti seg eisini at vera avgerandi málið í dystinum. TB kundi sjálvandi dúva meira upp á kontraspælið, nú teir høvdu lagt seg á odda, men hinvegin merkti tað ikki, at liðið gróv seg fullkomuliga niður. Serliga fyri steðgin, tá teir høvdu vindin undan, søktu teir nógv á Skálamálið, og tó at gestirnir kanska høvdu bóltin meira eftir steðgin, so var TB framvegis vandamiklara liðið. Fleiri mál fingu teir tó ikki, men tað eina av slagnum var kortini nokk. Tí tað var einki at fara skeivur av, at fagnaðurin kring Sevmýri var stórur eftir dystin.



*Annan heimadystin á rað megnaði TB at fáa fulla úrtøku, og við hesum hava teir fyribils lopið bukk um VB, sum nú er niðasta liðið*

Mynd: Áki Bertholdsen

### Farvæl til botnin

Og tað er eisini skilligt. Við sigrinum slapp TB sær av botnsessinum, sum teir hava røkt seinastu góðu tríggjar mánaðirnar, og heldur verandi støðan sær, so skal liðið í mesta lagi spæla um rættin til Formula-bólt komandi kappingarár.

Og tað kann enntá gerast enn betri. Verður talan um triða sigurin í slag, tá VB kemur á vitjan um tvær vikur, so verður sagt endaliga farvæl við botnsessin, eins og tað væl kann hugsast, at strikan millum áttanda og níggjunda plássið eisini verður niðanfyri TB.

### Slitið kostar

Hjá Skála man tað hinvegin vera heldur hugtungt at staðfesta, at úrtøkan seinastu nógvu umførini ikki hevur verið tann, sum roknast kann við av einum oddaliði.

Troystin er sjálvandi, at tað hevur hon heldur ikki verið hjá kappingarneytunum í oddastríðnum, men tapið hesa ferð gjørdi í øllum førum, at tað nú er enn truplari enn áður hjá Skála at gera seg galdandi heilt frammi á talvuni.

Og við komandi truplu uppgávuni á Eiði, kann eisini væl vera, at Skála skal ansa sær fyri NSÍ, sum tykist koma við fullari ferð aftan ífrá. Tað vildi í øllum førum verið ein niðurtúrur av teimum stóru, um liðið, sum í so nógvum umførum hevur verið heilt frammi í oddinum, brádliga skal finna seg sjálvt uttan fyri heiðursmerkjarøðina. Men tað er kanska á sín hátt eisini prísurin, sum eitt langt kappingarár við nógvari slitagu á lyklaspælarar hevur við sær. Tað kundi tó eisini hent seg, at tann prísurin í enn størri mun er galdandi fyri sambiðlarnar í oddastríðnum, men tað fara tey bæði seinastu umførini at vísa.

## Fakta um dystin

**TB-Skála 1-0 (1-0)**
**1-0** Dejan Tomic, 9.
**Dómari:** Lassin Isaksen
**TB:** Predrag Markovic - Predrag Zivkovic, Aca Petrovic, Óli Johannesen, Jón Tórður Holm - Allan Smedemark (Mortan Enni, 57.), Einar Petersen, Aleksandar Jovevic, Allan Poulsen - Hallur Christiansen (86.: Birgir Rasmussen), Dejan Tomic (Búi Mortensen, 90.)
**GK:** Hallur Christiansen, 17.
**Skála:** Eugen Voda - Rói Jacobsen, Rúni Rasmussen, Pætur Dam Jacobsen, Iulian Florescu - Bjarni Jørgensen (Alexandur Johansen, 26. (Arnhold Berg, 87.)), Nenad Stankovic, Pauli G. Hansen, Hanus Thorleifsson (Volmar Poulsen, 46.) - Bogi Gregersen, Jónhard Frederiksberg.
**GK:** Iulian Florescu, 43.

## Hava givið liðnum frið

Oddur Dimon er formaður í fótbóltsdeildini hjá TB, og hóast hann ásannar, at árið í ár ikki alla tíðina hevur verið eins stuttligt, so heldur hann ikki, at nevndin ella fótbóltsdeildini hevur roynt at blanda seg í tað, sum venjarin og spælararnir hava gjørt.

- Vit hava sum so eingi stig tikið til at broyta um gongdina. Trupulleikin hevur heldur ikki verið, at liðið hevur spælt illa, og tí hava vit ikki vilja farið at blandað okkum alt ov nógv. Ein áleypari er sjálvandi komin, men tað er so tað, sigur hann. Og í veruleikanum hevur liðið verið verri mannað í seinastuni, nú fleiri spælarar hava verið burtur frá av ymsum ávum.

Hinvegin leggur hann dent á, at tað kanska hevur hjálpt, at liðið seinastu dystirnar hevur verið meira ágangandi, enn teir annars hava verið í ár.

- Kanska hevur uppleggið verið ov verjukent í fleiri førum, og í øllum førum skapa vit fleiri møguleikar, nú tað verður spælt meira álopsspæl. Tað er so kanska eisini tí, at liðið nú noyddist at leypa á, tí munurin upp til næstu sessirnar var vorðin ov stórur.

Men hóast hann soleiðis viðgongur, at tað í dag er nakað nógv stuttligari at vera TB'ari, enn tað annars hevur verið í fleiri mánaðir, so noktar formaðurin í fótbóltsdeildini at selja skinnið. Ikki enn í øllum førum.

- Avgerandi dysturin verður móti VB um tvær vikur, og fyrr enn tá er einki avgjørt. Og her hava sigrarnir á GÍ og Skála so havt við sær, at vit hava ráð til javnleikin í tí dystinum. Hinvegin trúgvi eg, at um vit vinna tann dystin, so verða tað heldur ikki vit, sum skulu spæla um sessin móti næst besta aðrudeildarliðnum. Men at hetta tá verður ein spurningur, sum VB og GÍ mugu greiða sínamillum, sigur hann at enda.

**-mørk**

# Børnini kappaðust um FM

**Leygardagin skipaði Tórshavnar Súkklufelag fyri FM í einkultstarti fyri børn. Kappast bleiv í bólkunum 1, 2 og 3**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Leygardagin skipaði TSF fyri ársins seinastu súkklukapping. Kappast varð í FM í einkultstarti fyri børn og kappingin gekk fyri seg á vegnum millum Kaldbaksbotn og Kaldbak.

Luttøkan var góð, tí ikki færri enn 22 børn bjóðaðu hvør øðrum av.

Fýra føroyameistarar vórðu funnir, og millum hesar var Finnur Mellemgaard, ið hevur súkklað kapp í nøkur ár nú. Hann er stinnur í súkkling, og verður hugt eftir meðalferðini hjá Finni, sæst at hann súkklaði teir 4 km við einari rættiliga góðari meðalferð, nevniliga 37 km/t, sum er ein rættiliga góð meðalferð fyri ein súkklara í bólki 3.

Eins og tað sømir seg í stórum einkultstartkappingum, sluppu børnini á fyrsta sinni at starta av einum sokallaðum startrampa. Hetta var sjálvandi spennandi, hildu børnini.

Í bólki 2 var spenningur í, tí stutt var millum nummar eitt og trý, men munin átti Benjamin Thomassen, ið vann við ávikavist 22 og 24 sekundum á Hóra Brynhildarson og Janus í Bøgarði.

Ein góð og spennandi kapping við góðari undirtøku. Hetta fer tí vónandi at hava við sær, at TSF fer at skipa fyri enn fleiri súkklukappingum fyri børn. Livst so spyrst.

### Úrslit av FM í einkultstarti fyri børn:

Gentur, bólkur 1, 2 km:
1 Beinta á Bøgarði
2 Birita Dam
3 Eyð Jacobsen

Dreingir, bólkur 1, 2 km:
1 Rasmus Mohr Nielsen
2 Bogi á Vollanum
3 Ragnar Kruse
4 Martin Olsen
5 Mortan á Bøgarði
6 Andrias Dam
7 Rói Johannesen

Dreingir, bólkur 2, 3 km:
1 Benjamin Thomassen
2 Hóri Brynhildarson
3 Janus á Bøgarði
4 Bartal Veyhe)
5 Fríði av Vollanum

Dreingir, bólkur 3, 4 km:
1 Finnur Mellemgaard
2 Harald Joensen
3 Terji Jacobsen
4 Rógvi Reinert
5 Jens Pauli Johansen
6 Martin Kragesteen
7 Tóti Kristjansson